Skjal A

From: Jeanette Ellefsen Blaasvær <jeb@amr.fo>
Sent: hósdagur, 14. januar 2021 13:24
To: Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Subject: VS: Fíggjarnevndin

Fíggjarnevndin bað á fundi við landsstýriskvinnuna, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, 11. januar 2021 um at fáa upplýst, hvat tað hevur kostað at keypa og umvæla Torfinsgøtu, Hóvabrekku og at umvæla/útbyggja Garðsgøtu og hvussu nógv búpláss eru komin aftur at.

Svar:

Torfinsgøta varð keypt fyri 2,5 mió. kr., ið var ein serprísur. 5,7 mió. kr. eru brúktar til at umvæla húsini fyri. Fimm vanlig kømur eru erva, og búfólkini hava felags vesið og stovu og felags inngongd. Tvær smærri íbúðir við felags hentleikum eru í neðra.

Hóvabrekku er fyrrverandi næmingaheim til Skúlan á Trøðni, sum Mentamálaráðið lat Almannamálaráðnum uttan kostnað. Sambýlið er umvælt fyri 1,8 mió. kr. (8 vesir umvæld og tvær liftir monteraðar). Eisini eru smærri umvælingar fyri uml. 100 tús.kr. (vesir, grovkøkur, hvítvørur o.l.) gjørdar í 2017. Her er ikki talan um íbúðir, men um 15 smærri kømur, har búfólkini hava felags vesið og stovur, og felags inngongd.

Garðsgøta er eitt verandi sambýlið, sum er útbygt við tveimum íbúðum, umframt smærri innandura umvæling eru framdar í verandi húsi fyri 3,2 mió.kr. Tvey búpláss eru komin afturat verandi fimm- smærri kømur - búplássum.

Vinaliga/Sincerely

Jeanette Ellefsen Blaasvær
Fulltrúi/Head of Section